Kunngerðablaðið A

2025 Givið út 27. november 2025

Nr. 185 25. november 2025

**Kunngerð um broyting í kunngerð um upptøku til lestur á Fróðskaparsetri Føroya**
(Broyting av fylgiskjølum og upptøkutreytum í fylgiskjølum)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 98 frá 17. juni 2021 um upptøku til lestur á Fróðskaparsetri Føroya, sum broytt við kunngerð nr. 106 frá 25. juni 2021,verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 1, stk. 4 verður "sbrt. skjali 1" broytt til: "sbrt. skjali 2".

**2.** Skjal 1 í kunngerð nr. 98 frá 17. juni 2021 um upptøku til lestur á Fróðskaparsetri Føroya verður orðað sum ásett í skjali 1.

**3.** Skjal 2 verður sett sum skjal 2 í kunngerð nr. 98 frá 17. juni 2021 um upptøku til lestur á Fróðskaparsetri Føroya.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. mars 2026.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 25. november 2025

**Djóni Nolsøe Joensen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

**Skjal 1**

**“Skjal 1**

**Serkrøv um upptøku**

Umframt vanliga upptøkukravið hava niðanfyri nevndu útbúgvingar ávís serkrøv, ið umsøkjarin skal lúka.

Miðaltal í lærugreinunum verður roknað sum ársmet og próvtøkuúrslit býtt við so nógvum próvmetum, sum eru, t.d. eru tvey ársmet fyri munnligt og skrivligt og próvtøka hevur verið í báðum, so verða øll fýra próvmetini tald saman og síðani býtt (dividerað) við fýra.

| **Útbúgving:** | **Serkrav:** |
|---|---|
| Bachelor í føroyskum - mál og bókmentir | Føroyskt A.<br><br>*Miðaltalið í nevndu lærugreinini skal vera í minsta lagi 5,8 eftir 7-talsstiganum.* |
| Bachelor í búskaparfrøði | Støddfrøði B |
| Bachelor í lívfrøði | Alisfrøði B.<br>Støddfrøði B.<br>Evnafrøði B.<br><br>*Miðaltalið í hvørjari av nevndu lærugreinunum skal vera í minsta lagi 4 eftir 7-talsstiganum.* |
| Bachelor í KT-verkfrøði | Støddfrøði B.<br><br>*Miðaltalið í nevndu lærugrein skal vera í minsta lagi 4 eftir 7-talsstiganum.* |
| Bachelor í løgfrøði | Upptøkuroynd. |
| Bachelor í mýlalívsvísindum | Alisfrøði B.<br>Støddfrøði B.<br>Evnafrøði B.<br><br>*Miðaltalið í hvørjari av nevndu lærugreinunum skal vera í minsta lagi 4 eftir 7-talsstiganum ella 7 eftir 13-talsstiganum.* |
| Bachelor í verkfrøði | Støddfrøði A.<br>Alisfrøði B.<br>Evnafrøði C.<br><br>*Miðaltalið í støddfrøði skal vera minst 6 eftir 7-talsstiganum* ella *maskinmeistaraprógv við í minsta lagi miðaltalinum* 7 eftir 7-talsstiganum. |
| Bachelor í listaligum arbeiði | Listaligan profil.<br>Egið avrik - ritlist ella tónlist - fimm síður av skrivligum avriki ella 5 minuttir av tónleikaverki. |
| Bachelor sum fólkaskúlalærari | Føroyskt A.<br>Støddfrøði C. |
| Bachelor í sjúkrarøktarfrøði | 1. Føroyskt, danskt, svenskt ella norskt á C-stigi.<br>2. Enskt C.<br>3. Føroyskt, danskt, svenskt ella norskt við fráfaringarroynd fólkaskúlans.<br>*Málsliga kravið í pkt. 1 og 3 kann ikki verða á sama máli.* |

| | |
|---|---|
| Hjánám í støddfrøði | Støddfrøði A. |
| Hjánám í føroyskum | Føroyskt A.<br><br>*Miðaltalið í nevndu lærugreinini skal vera í minsta lagi 5,8 eftir 7-talsstiganum.*<br>Skal hava staðið ella vera innskrivaður til eina høvuðsgrein. |

”

**Skjal 2**

**“Skjal 2**

**Upptøka til ávísar útbúgvingar**

Í niðanfyri nevndu útbúgvingum verða aðrar útbúgvingar enn gymnasialar miðnámsútbúgvingar góðkendar sum upptøkutreyt fyri tær ítøkiligu útbúgvingarnar. Útbúgvingarnar geva upptøku við niðanfyri nevndu treytum.

Miðaltal í lærugreinunum verður roknað sum ársmet og próvtøkuúrslit býtt við so nógvum próvmetum, sum eru, t.d. eru tvey ársmet fyri munnligt og skrivligt og próvtøka hevur verið í báðum, so verða øll fýra próvmetini tald saman og síðani býtt (dividerað) við fýra.

| **Útbúgving:** | **Serkrav:** |
|---|---|
| Diplom í námsfrøði | Umsøkjarar, sum hava lokið útbúgving sum námsfrøðihjálpari á Heilsuskúla Føroya ella pedagogiskur assistentur á donskum lærustovni, kunnu við upptøkuroynd verða tikin inn á útbúgvingina. |
| Bachelor sum námsfrøðingur | Umsøkjarar, sum hava lokið útbúgvingina diplom í námsfrøði, kunnu verða tikin inn á útbúgvingina. |
| Bachelor í sjúkrarøktarfrøði | Umsøkjarar, sum hava lokið útbúgving sum heilsurøktari á Heilsuskúla Føroya ella SOSU-assistentur frá donskum lærustovni, kunnu verða tikin inn á útbúgvingina.<br><br>*Miðaltalið fyri prógvið skal vera í minsta lagi 6 eftir 7-talsstiganum.* |

”